## DAGSINS MEINING

# Einki annað ann kávalótir

Eftir øllum at døma verður málið um eftirlønarskipanina hjá løgtings- og landsstýrismonnum tikin uppaftur. Tað hendir, eftir ein røð av løgtingslimum hava vaskað hendur, og eftir at varaløgmaður hevur boðað frá, at hann er sinnaður at taka málið uppaftur. Vit skulu ikki viðgera tær ymisku umberingarnar her, men bara siga, at talan er um hykl av ringasta slag. Einki annað enn kávalótir - “går den så går den”.

Men tað gekk bara ikki hesuferð, og orsøkin var, at SVF setti tølini á, hvussu órímiliga høgar eftirlønir Løgtingið hevur lóggivið til løgtings- og landsstýrislimir. Sig so, at fjølmiðlar ikki hava ávirkan. Og útrokningarnar hjá Sosialinum í leygardagsblaðnum vísa, at eftirlønirnar kosta bara fyri verandi landsstýris- og tingmanning, um hesi liva ein meðalaldur, ein heilan Brimil.

Hesi tøl - henda órímiligheit - man gera sítt til, at nærum hvørt mansbarn, sum kemur inn í ein handil, setir navn sítt undir mótmælið. Hetta mótmælið skal væntandi í hesi vikuni handast landsstýrinum. Henda stóra undirtøka vísir, at Føroya fólk góðtekur ikki alt, og eru ikki heilt rurað í blund í øllum fullveldisrúsinum. Men tá tað er sagt, er at vóna, at fólk eru líka árvakin, tá tað snýr seg um líka stórar órættvísar í samfelagi okkara.

Málið um eftirlønirnar er óivað eitt súrt súrepli hjá okkara politikkarum, men nú slepst ikki undan, at teir verða noyddir at lóggeva sær eina lægri eftirløn. Tað er einki annað enn tvært, tá formaðurin í Sjálvstýrisflokkurin mælir til, at nevnd, sum hevur innlit í slík viðurskifti, skal áseta lønir og eftirlønir hjá politikkarunum.

Vit hava eitt fíggjarmálastýri, sum á hvørjum ári samráðaist - og roknar út - lønir og eftirlønir, so har skuldi verið góður serkunnleiki til eisini at seta eftirlønirnar hjá løgtings- og landsstýrismonnunum á eitt rímuligt og hóskiligt stig. Tí tað duga teir so ikki, og tað er prógvað so dyggiliga!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Til allar føroysku politikararnar!!!

**Teir eru framúr óforskammaðir og frekir í teirra lønar- og pensjónkrøvum**

**Palli Olsen**
*Skálavík*

Tað fellur mær fyri bróstið at hoyra, hvussu okkara myndugleikar válka sær í lønar- og pensjónskrøvum.

Tað hava verið tvey mál fyri nú hesar seinastu 8-10 mánaðirnar, Brimil óloyst og so Teistin og her hava menn roynt at fingið nakað av løn fyri at yvirliva og koma nøkulunda á sama støði sum í londunum rundan um okkum, men tað hevur verið nei og aftur nei frá politikarunum.

So sita hesir somu lortungarnir og játta sær sjálvum skýhøgar lønir og pensjónir, og so oman á tað heila, so skulu teir eisini geva sær og øðrum, sum langt síðan eru farnir frá (settir frá), bæði av tí at teir eru kasseraðir og av ólógligheitum og óbrúkiligum grundum. Nei, teir kendu treytirnar, tá ið teir tóku við teirra størvum í sínari tíð og teir hava so slettis ikki uppiborið nakað bonus frá okkum, tað skuldi heldur verið vit, sum stríðast, sum skuldu fingið bonus fyri okkara arbeiði.

Tit mugu ansa eftir hvat tað er ið tit gera, tit kunnu ikki blása við fullum munni av mjøli, brúkið for sørin høvdið og ikki undirvurdera okkum meinigu borgarar, tí vit vita eisini hóast alt eitt lítið sindur um lønir, verið greiðir yvir tað.

# Um at vaska hendur í pensiónsmálinum

**Jenis av Rana**
*løgtingsmaður*



Í dagliga handatvátti sínum í fjølmiðlunum farnu vikuna leggur formaður sjálvstýrisfloksins upp til at fáa stuðul frá tingmonnum at leggja fram eitt broytingaruppskot viðvíkjandi pensiónum til landsstýrismenn. Miðfloksins vegna ynski eg at gera greitt, at eitt uppskot um skilagóðar broytingar fær fullan stuðul, men vit vóna, at slíkt uppskot kemur frá aðrari síðu, skilabest hevði verið at landsstýrið kom við tí. Kemur uppskotið frá tingkvinnuni, hætti eg mær ikki at verða við, til tað ræða sporini ov nógv- ikki bert í hesum málinum!

At rógva upp undir, at tingmenn møguliga hava gjørt broytingar, sum eru í andsøgn við endamálið, og at tingmenn ikki hava verið greiðir yvir fylgurnar av uppskotinum, er burturvið og ein løgin roynd at manipulera. Fullvæl vóru vit greið yvir endamálið við uppskotinum hjá Helenu & Co, lat ongan iva verða um tað. Sjálvur minnist eg so væl tær viðmerkingar, grannin við tingborðið og eg høvdu, tá skjalið við broytingaruppskotinum lá á borðinum fyri okkum, beint áðrenn atkvøðast skuldi. Tað vóru neyvar viðmerkingar um hvat tey nú borðreiddu sær sjálvum, og heitið vit báðir settu á uppskotið var stutt og greitt “svínari “- og hvørgin atkvøddi fyri tí.

Vón mín og áheitan á fjølmiðlarnar er, nú tit eru í holt við pensiónsspurningin, at fara víðari og viðgera tann órætt, ið verður framdur móti stóra partinum av borgarum, sum fáa eina pensión, sum als ikki er at liva av og ikki hevur uppiborið heitið pensión. Tit áttu at kanna, hvat ikki bert politikkarar, men eisini fakfelagsleiðarar, hava tykist við mongu farnu árini, hví teir, undantikið onkur einstakur, ikki hava røkt hesi áhugamál lima sína. Í hesum sambandi hugsi eg um dømi, sum eldri maður segði mær. Hann fekk í dag, eftir at hava siglt við útlendskum reiðari frá ungum av, kr 24.000,- sendandi inn dyrnar hvønn mánaða- grannar hansara, ið hava stríðst við føroyskum skipi ella kanska vunnið sær inntøkuna uppi á landi, fáa kanska tær 4.000,-. Her eru veruliga nøkur, ið ikki hava røkt teirra skyldu yvir fyri egnum limum.

†

Jarðarferðin hjá

**Nancy Heinesen,**
**Saltangará,**
**búsitandi í Havn**

verður týsdagin 24. juli kl. 14.00 úr Berøa.

*Familjunnar vegna*

**Alma, Karolina, Hanus, Olga og Debus**

Tey, ið vilja minnast Nancy, kunnu lata eina peningagávu til trúboðaravirksemið í Nuuk í Grønlandi, konto í peningastovnunum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.






*I AM vónar, at okkurt fer at koma burtur úr ferðini, sum bólkurin gjørdi til Noregs fyrr í mánaðinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vóna at okkurt spyrst burturúr Noregsferðini

**Føroyski gospelrockbólkurin, I AM, er spentur eftir at vita, um nakað fer at spyrjast burtur úr sambandinum við norska plátufelagið FriBU**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Fyrr í juli mánaði spældi føroyski gospelbólkurin I AM á størsta norðureuropeiska gospelfestivalinum. Framførslurnar eydnaðust sera væl, og á ferðini í Noregi hitti I AM fleiri áhugaverdar persónar.

Norska plátufelagið FriBU sýndi I AM áhuga, og partarnir tosaðu saman undir festivalinum á Risøoya. Møguliga kemur eitthvørt samstarv upp á tal millum FriBU og I AM, men enn hevur føroyski bólkurin ikki frætt meiri úr Noregi.

- Hetta rættiliga spennandi, og eg vóni at okkurt spyrt burturúr sambandinum við FriBU. Um ikki, so kunnu vit altíð royna eydnuna enn einaferð, sigur Birgir Sigurðsson, sangari í I AM.

## FriBU ger mun

FriuBU hvur seinasta árið marknaðarført ein bólk, ið kallast Salvation Street, og teir eru komnir rættiliga nógv fram í Norðurlondum. Seinni í summar skal hesin bólkurin til Onglands og Hollands at luttaka á stórum festivalum har. Eisini hava teir just fingið plátusáttmála vid Word Music í Onglandi. Hetta plátufelag er eitt tað størsta innan andaligan tónleik í heiminum.

Tað hevði tí verið ein spennandi møguleiki, um FriBU hevði hug at gera okkurt fyri at fáa I AM fram.

Á ferðini í Noregi vóru teir í I AM spurdir, um teir møguliga vildi taka lut á einum ungdómsfestivali, sum skal verða í Bergen í heyst. Teir játtaðu hálvavegna, men enn er ikki avgjørt, um I AM verða við á festivalinum.

## Ólavsøka

I AM verður ein av bólkunum, sum fara at spæla á ólavsøkukonsertini í ár.

– Hóast vit eru ein gospelbólkur, so halda vit, at vit, at vit hoyra heima á ólavsøkukonsertini líka so væl sum allir hinir bólkarnir, sigur Birgir Sigurðsson.

– Vit hava ein boðskap at bera, og vit kunnu líka so væl syngja um Jesus, sum Eyðun og Terji syngja um »eitt nummar« á ólavsøkukonsertini, heldur hann.

Hetta er aðru ferð, at I AM spæla á ólavsøkukonsertini.

# Summarkonsert við Cantabile

Mikukvøldið 25. juli verður ein summarkonsert við kórinum Cantabile í Kommunuskúla auluni kl. 19.00.

Í mai mánað var Cantabile á konsertferð í Danmark, har tey eisini luttóku á einari norðuratlantiskari kórstevnu. Skráin fyri konsertina mikukvøldið er í høvuðsheitum hin sama sum á Danmarkarferðini.

Cantabile hevur biðið unga trombonleikaran, Andras Olsen, verða gestatónleikara á konsertini, og hann fer at spæla tvey smærri verk. Andrass Olsen er heima í summarfrí frá sínum tónleikalesnaði í Onglandi.

Sangirnir, ið Cantabile fer at syngja á konsertini, eru eitt bland av spennandi nýggjum og góðum gomlum, av kendum føroyskum og minni kendum útlendskum sangum.

Cantabile er eitt sera virkið kór og hevur síðani síðsta summar verið samansett av 13 sangarum, og hava tey vant undir leiðslu av Benjamin Gaasedal, einum av teimum yngru kórlimunum, síðan Pauli í Sandágerði flutti niður. Pauli hevur tó, við jøvnum millumbilum, vitjað her heima og vant við kórinum.

Kostnaður fyri konsertina í Kommunuskúla auluni mikukvøldið 25. juli kl 19.00 er 50 krónur.




Farmadeildin søkir
SAMSKIPARA

Arbeiðsuppgávan er at samskipa allan flutning av farmi og umsita útgerð okkara og aðrar viðkomandi uppgávur.

Førleiki:
· tann ið settur verður skal hava góð leiðslu- og samstarvsevni
· hava royndir í farmavinnuni - t.d. stýrimaður við hollum royndum
· skal hava koyrikort til trukk og trailara ella taka trailarakoyrikort í næstum
· EDV á brúkarastøði

Arbeiðstíð:
Eftir avtalu. Arbeiðið krevur skiftandi arbeiðstíðir.

Løn:
Sambært avtalu.

Starvið verður at seta skjótast til ber.



Skipsdeildin søkir
2 LÆRLINGAR



Flogdeildin søkir
1 LÆRLING

Umsókn við møguligum prógvum og upplýsingum um royndir annars skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. august 2001.

Meira fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara á tel. 34 59 00.

SMYRIL LINE
Postboks 370 • 110 Tórshavn